# ítróttur

Nr. 3 • leygardagur • 5. januar 2001 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Heðin aftur til Klaksvíkar

**Heðin á Lakjuni, sum í fjør gjørdist føroya-meistari við B36, fer nú aftur til KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fríggjadagsblað okkara var ikki meira enn farið til prentingar, tá KÍ á heimasíðu sínari, www.ki-klaksvik.fo, skrivaði, at Heðin á Lakjuni aftur verður í Klaksvík komandi kappingarár.

Stutt undan jólum segði Heðin á Lakjuni í viðtali við Sosialin, at hann hevði tilboð frá tveimum føroyskum feløgum, og gitt varð tá, at hesi vóru KÍ og B36.

Nú hevur longu tvífaldi føroyameistarin so tikið avgerð um, at tað verður í Klaksvík, at fótbóltsskógvarnir skulu slítast komandi árið.

Tað hevur annars verið upp á tal, at Heðin skuldi flyta til Danmarkar at búgva, men hann hevur tó gjørt av at taka í øllum førum eitt ár afturat í Føroyum.



*Eftir at hann í fjør gjørdist meistari við B36, hevur Heðin á Lakjuni nú gjørt av, at komandi fótbóltsárið skal fara fram í Klaksvík*

### Tekur skap

Tað skerst ikki burtur, at KÍ við hesum hevur fingið enn ein týdningarmiklan brikk í fótbóltsputlispælinum hjá Kurt Mørkøre. Framman undan er longu greitt, at Allan Mørkøre kemur norður til barndómsfelagið, eins og bæði útlendski Alexander Djordjevic og evnaríki Hjalgrím Elttør hava gjørt av at halda fram í felagnum.

Kanska eru tað hornasteinarnir til eitt nýtt stórlið, sum Kurt Mørkøre nú er við at fáa í rættlag, og hvør veit, um tað nú ikki aftur fer at gerast stuttligari at fara til fótbólt við Djúpimýru, enn tað hevur verið tey bæði seinnu árini.

# Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 342 | 214 | 128 | 12 |
| 2 Stjørnan | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 314 | 254 | 60 | 9 |
| 3 Neistin | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 262 | 226 | 36 | 8 |
| 4 VB | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 282 | 295 | -13 | 6 |
| 5 Kyndil | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 271 | 310 | -39 | 3 |
| 6 Sóljan | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 215 | 309 | -94 | 2 |
| 7 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 200 | 278 | -78 | 1 |

**Viðm.:** Dysturin, Sóljan-StÍF, frá grundspælinum restar enn at spæla. Hesin verður sambært tillagaðu kappingarskipanini leiktur hin 12. januar

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 322 | 260 | 62 | 10 |
| 2 Neistin | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 354 | 292 | 62 | 10 |
| 3 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 326 | 315 | 11 | 6 |
| 4 H71 | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 329 | 334 | -5 | 6 |
| 5 KÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 314 | 354 | -40 | 4 |
| 6 Tjaldur | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 290 | 332 | -42 | 4 |
| 7 Kyndil | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 274 | 322 | -48 | 2 |

**Viðm.:** Dysturin, VÍF-Neistin, frá grundspælinum restar enn at spæla. Hesin verður sambært tillagaðu kappingarskipanini leiktur hin 9. januar

# Broytingar í skipanini

Tá kappingarskráin fyri inniverandi hondbóltsár varð løgd í fjør summar, var ein av fortreytunum fyri hesari, at nýggja høllin í Hoyvík stóð klár eftir ársskiftið.

Sum kunnugt varð hetta tó av ongum, og saman við hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini hevur hetta gjørt, at nakrar flytingar av dystum gjørdust neyðugar.

Niðanfyristandandi yvirlit er sent okkum av HSF, og sýnir hetta, hvussu dystirnir í teimum báðum fremstu hondbóltsdeildunum verða leiktir fram til hálvan februar.

Av yvirlitinum framgongur annars, at HSF vónar, at høllin í Hoyvík verður tøk til dystir tíðliga í februar, og um so er, verður fyrsti fyrstudeildardysturin í nýggju høllini hin 3 februar, tá VÍF kemur á vitjan.

| dagf. | kl. | heimalið- | | útilið | | deild |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 05/01/02 | 16:00 | Sóljan | - | VÍF | | Kv I |
| 05/01/02 | 16:00 | H 71 | - | Neistin | | M I |
| 06/01/02 | 14:30 | Kyndil | - | Stjørnan | | Kv I |
| 06/01/02 | 16:00 | Kyndil | - | KÍF | | M I |
| 06/01/02 | 16:00 | Tjaldur | - | VÍF | | M I |
| 06/01/02 | 13:30 | VB | - | Neistin | | Kv I |
| 09/01/02 | 20:00 | VÍF | - | Neistin | | M I |
| 12/01/02 | 17:00 | Stjørnan | - | VB | 1.hálvfinala | Kv I |
| 12/01/02 | 16:00 | Sóljan | - | StÍF | | Kv I |
| 13/01/02 | 14:30 | Neistin | - | Kyndil | | Kv I |
| 13/01/02 | 16:00 | Neistin | - | Kyndil | | M I |
| 13/01/02 | 16:00 | Stjørnan | - | Sóljan | | Kv I |
| 13/01/02 | 14:30 | StÍF | - | VB | | Kv I |
| 13/01/02 | 16:00 | StÍF | - | H 71 | | M I |
| 13/01/02 | 16:00 | VÍF | - | KÍF | | M I |
| 15/01/02 | 20:00 | KÍF | - | Tjaldur | | M I |
| 16/01/02 | 18:30 | Neistin | - | VÍF | 1.hálvfinalan | Kv I |
| 16/01/02 | 20:00 | H 71 | - | Neistin | 1.hálvfinalan | M I |
| 16/01/02 | 20:00 | StÍF | - | VÍF | 1.hálvfinalan | M I |
| 19/01/02 | 17:00 | VB | - | Stjørnan | 2.hálvfinalan | Kv I |
| 19/01/02 | 16:00 | H 71 | - | Kyndil | | M I |
| 20/01/02 | 14:30 | Neistin | - | VÍF | | Kv I |
| 20/01/02 | 16:00 | Neistin | - | VÍF | | M I |
| 20/01/02 | 14:30 | StÍF | - | Sóljan | | Kv I |
| 20/01/02 | 16:00 | StÍF | - | Tjaldur | | M I |
| 20/01/02 | 13:30 | VB | - | Kyndil | | Kv I |
| 23/01/02 | 18:30 | VÍF | - | Neistin | 2.hálvfinalan | Kv I |
| 23/01/02 | 20:00 | VÍF | - | StÍF | 2.hálvfinalan | M I |
| 23/01/02 | 20:00 | Neistin | - | H 71 | 2.hálvfinalan | M I |
| 26/01/02 | 15:00 | Sóljan | - | VB | | Kv I |
| 26/01/02 | 17:50 | KÍF | - | Neistin | | M I |
| 27/01/02 | 15:00 | Stjørnan | - | Neistin | | Kv I |
| 27/01/02 | 16:00 | Tjaldur | - | H 71 | | M I |
| 27/01/02 | 14:30 | VÍF | - | StÍF | | Kv I |
| 27/01/02 | 16:00 | VÍF | - | StÍF | | M I |
| 03/02/02 | 14:30 | Kyndil | - | Sóljan | | Kv I |
| 03/02/02 | 16:00 | Kyndil | - | Tjaldur | | M I |
| 03/02/02 | 16:00 | H 71 | - | VÍF | | M I |
| 03/02/02 | 14:30 | StÍF | - | Stjørnan | | Kv I |
| 03/02/02 | 16:00 | StÍF | - | KÍF | | M I |
| 03/02/02 | 13:30 | VB | - | VÍF | | Kv I |
| 06/02/02 | 18:30 | Kyndil | - | StÍF | | Kv I |
| 06/02/02 | 20:00 | Kyndil | - | StÍF | | M I |
| 06/02/02 | 20:00 | Tjaldur | - | Neistin | | M I |
| 09/02/02 | 16:00 | Sóljan | - | Neistin | | Kv I |
| 09/02/02 | 14:30 | Stjørnan | - | VB | | Kv I |
| 10/02/02 | 14:30 | Neistin | - | StÍF | | Kv I |
| 14/02/02 | 18:30 | VÍF | - | Kyndil | | Kv I |
| 16/02/02 | 13:40 | VÍF | - | Stjørnan | | Kv I |

# Botndysturin verður um eina viku

Av dagførda dystaryvirlitinum hjá HSF fyri januar mánað framgongur, at dysturin millum kvinnuliðini hjá Sóljuni og StÍF nú er ásettur at verða leiktur 12. januar.

Dysturin er annars í tveimum umførum útsettur. Fyrst tí høllin á Giljanesi ikki var tøk til endamálið, og síðani tí StÍF ikki møtti upp á nýggja leikdegnum, tó at hvørki Sóljan ella dómararnir til dystin høvdu fingið boð um hetta.

Sóljan hevur annars harðliga mótmælt, at HSF nú enn einaferð hevur gjørt av at flyta dystin, men sambært skipanini er hann so settur á skránna til annan leygardag.

*-jm*



# Tvær endurtøkur

**Hjá kvinnunum verður talan um tvær endurtøkur í mun til seinasta umfar í grundspælinum, og spennandi verður at síggja, hvar Kyndil og Stjørnan standa í løtuni**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Tveir av dystunum í bestu kvinnudeildini hetta vikuskiftið verða endurtøkur av dystum frá seinasta umfarinum í grundspælinum.

Tá vunnu VÍF og Neistin tryggar sigrar á ávíkavist Sóljuni og VB, og í øllum førum má roknast við, at Sóljan fer at fáa meira enn trupult við at broyta nakað sum helst í so máta, tá VÍF nú aftur kemur á vitjan.

Viðvíkjandi VB, so er eingin loyna, at tær helst ætla sær eitt øðrvísi úrslit, nú tær aftur leggja leiðina til Havnar. Hvørt hetta so fer at eydnast, er ein spurningur, sum ikki skal svarast her, men tað er givið, at um VB ikki megnar at fáa bæði stigini í hesi uppgerðini, so kann tað gerast meira enn trupult hjá teimum at blanda seg upp í heiðursmerkjastríðið, har tær annars heilt víst ætlaðu sær at vera, tá lagt varð til brots undan kappingarárinum.

### Spennandi á Hálsi

Tað er tó ikki minst dysturin millum Kyndil og Stjørnuna, sum tykist spennandi í hesum umfarinum hjá kvinnunum.

Tá komið var gott og væl um helvtina av grundspælinum, vóru lítil og eingi tekin um, at hendan uppgerðin skuldi gerast serliga spennandi, men sum seinastu vikurnar undan jólum lagaðu seg, er magnt snarað á í so máta.

Kyndil byrjaði loksins at sýna tað spæl, sum tey flestu vita tær eru førar fyri, og hetta gav teimum eisini nøkur harðliga tiltrongd stig beint undan jólasteðginum, soleiðis at tær fingu lyft seg úr botninum.

Hinvegin tóktist luftin fullkomuliga at vera farin burtur úr annars høgt flúgvandi stjørnunum úr Klaksvík seinastu dystirnar í grundspælinum. Ja, somikið illa gekst í hond við spælinum, at klaksvíkingar veruliga eru farnir at tosa um kreppu á liðnum, og tað er hendan gongdin, sum liðið skal royna at venda, nú farið verður undir endaspælið.

Hótta VÍF á fremsta sessinum kunnu tær úr Klaksvík neyvan, men undir øllum umstøðum ætla tær sær at halda fast um silvurmerkini, og skal hetta eydnast er alneyðugt, at stigasavnanin í endaspælinum fer í gongd alt fyri eitt, tí sum kunnugt hava reglurnar við grund- og endaspæli við sær, at fyrimunurin fram um næstu liðini varð skorin í helvt í jólasteðginum.



*Spennandi verður at vita, hvørt Kyndil nú veruliga hevur fingið ferð á, ella um talan bert var um eitt upplop seinastu dystirnar í grundspælinum*

# Aðalfundurin settur á skránna

**Nýggi formaðurin hjá FSF skal veljast á aðalfundinum, sum verður í Norðurlandahúsinum hin 23. februar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fótbóltssamband Føroya hevur nú boðað feløgunum kring landið frá, at ársaðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum hin 23. februar.

Enn er ikki greitt, hvørji mál fara at koma inn til fundin, men uttan iva er eitt hitt mest áhugaverda á fundinum, at hetta verður dagurin, tá nýggjur formaður skal veljast til FSF.

Vit hava áður viðgjørt hetta evni, og ivaleyst fara nógvar gitingar at verða um ein komandi fótbóltsboss, men enn eru so eingi evni komin í uppskoti til aðalfundin. Freistin fyri at senda inn uppskot til nevndarval er 10 dagar undan aðalfundinum. Tað vil siga, at 14. februar er um ikki annað greitt, hvørji valevnini til sessin fara at verða.

Umframt Torleif Sigurðsson, fráfarandi formann, standa tríggir nevndarlimir í FSF fyri vali. Hesir eru Dánjal Andreasen, Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt.

# Tvær grannauppgerðir í Havn

**Meðan Vestmenningar fara til Runavík at royna seg, skulu tey fýra havnarfeløgini spæla tvær lokaluppgerðir um vikuskifitð**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Síðani kommunalu samanrenningina ímillum Havnina og Kollafjørð, er talið av hondbóltsfeløgum í høvuðsstaðnum økt upp í fýra. Hesi fara um vikuskiftið at spæla tvær lokaluppgerðir, og verður fyrra av teimum millum tey bæði ovaru liðini í høvuðsstaðnum.



*Ætlanin var, at dysturin hjá H71 móti Neistanum skuldi verða hin fyrsti í nýggju høllini, men innvíanin av hesari má bíða í øllum førum eina mánað*

### Eingin høll

Upprunaliga var ætlanin, at dysturin millum H71 og Neistan skuldi verða fyrsti landskappingardysturin í bestu mansdeildini, sum varð leiktur í nýggju høllini í Hoyvík, men soleiðis verður ikki, og ístaðin verður dysturin leiktur í Høllini á Hálsi.

Hetta fær tó á ongan hátt forðað fyri teirri sannroynd, at talan lættliga kann gerast um ein sera spennandi dyst millum tvey av liðunum, sum ætla sær heiðursmerki í ár, og samstundis er hetta eisini eitt slag av forsmakki upp á hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini, sum liðini skulu avgreiða seinni í hesum mánaðinum.

Einki er at ivast í, at Neistin er favorittur at vinna dystin, men hoyvíkingar hava í løtum víst, at teir væl kunnu standa sterkastu liðunum kurl, og raka teir rætta dagin, skulu bláu neistamenninir so avgjørt ikki taka nakað fyri givið.

Spennandi tykist tað eisini at verða, tá Kyndil so sunnudagin spælir hina grannauppgerðina, tá KÍF kemur á vitjan.

Kyndil hevði eitt út av lagi vánaligt grundspæl, og skal hetta rættast upp, er ivaleyst neyðugt, at stig verða vunnin frá kollfirðingum, sum í løtuni eru tvey stig framman fyri Kyndil á stigatalvuni. Ein munur, sum helst ikki skal økjast, um Kyndil skal vinna seg úr botninum.

Kollfirðingar hava tó seinnu árini havt lyndi til at hava eitt sera gott endaspæl, so tað kann væl vísa seg, at tað als ikki verður her, at Kyndil skal vinna sær stigini, men tað er so nakað, sum bert tíðin kann vísa.

### Hvussu við Tjaldri

Seinasti dysturin verður í Runavík, har føroyameistararnir úr VÍF koma á vitjan. Í grundspælinum vann VÍF trygt í tilsvarandi dystinum, men sum Tjaldur hevur leikt í ár, skal ein ongan tíð kenna seg ov tryggan. Snøgt sagt, so hava upp- og niðurtúrarnir í spælinum verið óvanliga stórir, og eru teir á aldukambinum, so kunnu teir væl geva vestmenningum dygga mótstøðu, men vestmenningar eru so undir øllum umstøðum favorittar at vinna dystin.